

*Fiskirannsóknarstovan sigur, at verður hildið fast um sama dagatal í fleiri ár, verður okkurt ár neyðugt at taka dagatal av fyri fleiri ár í senn. Tí er alsamt neyðugt at minka fiskidagatalið*

*Mynd: Reuters*

# Stórur vandi fyri toskinum undir Føroyum

**– Vandi er fyri, at toskurin longu um tvey ár er komin niður á sama støðið, sum hann var á fyri 12-13 árum síðani. Og tað er tað ringasta, vit vita um, sigur Fiskirannsóknarstovan**

STOVNSMETINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Toskaskastovnurin undir Føroyum er í minking. Og sum støðan er nú, er vandi fyri at hann longu í 2006, kemur niður á sama støði sum í 1991 og 1992. Og hetta er tað minsta, vit vita um.

Fiskirannsóknarstovan rópar aftur varskó.

Í tilmælinum, sum hon hevur júst hevur latið landsstýrismanninum í fiskivinnumálum um fiskiskapin komandi ár, ávarar Fiskirannsóknarstovan um støðuna.

Hon sigur, at sum støðan er nú, er tað neyðugt at minka munandi um veiðitrýstið á tosk á Landgrunninum.

– Hetta kann gerast við at skerja dagatalið hjá teimum skipabólkum, ið mest fiska tosk, at minka kvoturnar av toski hjá lemmatrolarunum, og/ella at steingja leiðir.

Rannsóknarstovan sigur somuleiðis, at toskastovnurin á Føroyabanka er í minking.

– Dagatalið vaks nógv í 2003 til umleið tvær ferðir so nógv sum tað var í miðal í 1996-2002.

So stóra roynd tolir toskurin á Føroya Banka ikki og tí er eisini neyðugt at skerja dagatalið á Bankanum munandi.

Hinvegin heldur Fiskirannsóknarstovan, at stovnarnir av hýsu og upsa eru oman fyri miðal og sum veiðitrýstið er nú, fara teir at halda sær har.

– Veiðitrýstið er tó í hægra lagi, serliga fyri upsa, og rættast hevði eisini verið at minka dagatalið her.

### Ein vansi við dagaskipanin

Fiskirannróknarstovan vísir á, at í nógvar mátar er dagaskipanin skilagóð, serliga við atliti til útblaking.

– Men skipanin hevur tann vansa, at við støðugu framgongdini í tøkni, er neyðugt alsamt at minka um dagatalið fyri at halda veiðusetningin.

Sum manningin á Fiskirannsóknarstovuni er nú, ber ikki til at at eygleiða fiskiskapin so neyvt, at árligi vøksturin kann skrásetast so hvørt.

– Vit hava tí bert stovnsmetingarnar at halda okkum til, og har sæst m.a., hvussu gongdin í veiðutrýstinum er.

Fiskirannsóknarstovan sigur, at verður hildið fast um sama dagatal í fleiri ár, verður okkurt ár neyðugt at taka dagatal av fyri fleiri ár í senn.

– Og tá verður niðurskurðurin tá so stórur, at skip og bátar fara at hava stórar trupulleikar at laga seg til minkingina.

# Veiðitrýstið má minka niður í helvt alt fyri eitt

**Skal toskurin undir Føroyum koma fyri seg aftur, er tað umráðandi, at veiðitrýstið verður minkað niður í helvt beinanvegin, sigur Fiskirannsóknarstovan**

STOVNSMETINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

| | Toskur á landgrunninum | Hýsa | Upsi |
|---|---|---|---|
| Mett veiðutrýst 2003 | 58% | 24% | 29% |
| Miðal veiðutrýst 1997-2003 | 43% | 28% | 29% |
| ICES tilmælt veiðutrýst | 27% | 20% | 22% |
| Veiðusetningur | 33% | 33% | 33% |

Hendan talvan vísur, hvussu støðan í fiskiskapinum hevur verið hesi seinastu árini

– Tað er umráðandi at veiðitrýstið eftir toski undir Føroyum, beinanvegin verður minkað niður í eina helvt.

Og so skal veiðtrýstið haldast á tí støðinum.

Í tilmælinum, sum Fiskirannsóknarstovan týsdagin gav Bjørn Kalsø, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, um fiskiskapin komandi ár, mælir hon til at ein ætlan verður gjørd fyri at fáa toskastovnin á landgrunninum at koma fyri seg aftur.

– Verður ikki allur beinleiðis fiskiskapur eftir toski steðgaður, gerst hetta ikki eftir einum ári.

Tí mælir Fiskirannsóknarstovan ístaðin til at ein ætlan verður løgd, sum fevnir um eini 3-5 ár.

– Ein máti at minka veiðitrýstið, er at minka dagatalið hjá húkaflotanum 50%. Ein annar máti er, at dagatalið hjá húkaflotanum verður minkað 25%, samstundis sum innaru leiðirnar verða meiri friðaðar fyri at minka royndina eftir smáfiski.

Fiskirannsóknarstovan sigur at ein partur av hesi ætlan kundi verið, at leiðirnar innan fyri fýra fjórðingar verða friðaðar fyri øllum vinnuligum fiskiskapi, og at línuskipini ikki sleppa at fiska nærri landi enn átta fjórðingar.

- Men serliga eigur toska- og hýsukvotan, sum lemmatrolararnir hava fingið, at detta burtur. Ístaðin eiga lemmatrolararnir at koma upp í dagaskipanini.

Samstundis mælir Fiskirannsóknarstovan til, at loyvda dagatalið á Føroyabanka eigur at verða sum miðal dagatalið í 1996-2002.

Dagatalið í beinleiðis veiði eftir upsa eigur fyri fiskiárið 2004-2005 at 1verða skert 25% afturímóti fiskiárinum 2003-2004.

Annars sigur fiskirannsóknarstovan, at broytast fortreytirnar, t.d. við at gróðurin verður betur enn miðal, kann dagatal og vídd á stongdum leiðum endurskoðast.

### Veiðitrýstið ov stórt

Lógin um vinnuligan fiskiskap miðar ímóti, at veiðitrýstið í miðal fyri tosk, hýsu og upsa er 33%. Seinastu stovnsmetingarnar vísa, at veiðitrýstið eftir toski er 58%, eftir hýsu 24% og eftir upsa 29% Fyri at halda veiðusetningin er neyðugt at minka royndina eftir toski so mikið, at veiðutrýstið er í samsvar við setningin.

Hinvegin metir ICES, at fyrivarnið er ov lítið við einum veiðisetningi uppá 33%, serliga fyri hýsu og upsa. Í staðin fyri verður mælt til, at veiðitrýstið verður minni enn 27% fyri tosk, 20% fyri hýsu og 22% fyri upsa.

Nýggjastu metingarnar vísa kortini, at hetta kann hækkast nakað, men tó er 33% ov høgt.

Sí talvu!

Fiskirannsóknarstovan mælir til, at veiðisetningur verður gjørdur fyri hvønn stovn sær.

- Hetta skal vísa, hvussu harðan fiskiskap stovnurin tolir, uttan at ganga gýtingarstovninum ov nær. Fyri tosk, hýsu og upsa undir Føroyum er veiðisetningurin -veiðutrýstið- 33%. Tað merkir, at talið á fiskidøgum, umframt aðrar reguleringar, skal ásetast soleiðis, at veiðan í miðal av ávikavist toski, hýsu og upsa ikki má vera meiri enn 33% av stovnunum í tali.

- Fiskirannsóknarstovan ger eisini vart við, at hóast veiðitrýstið verður minkað, er tað ikki tað sama, sum at fiskiskapurin veiðan fer at versna.

- Verður veiðitrýstið minkað, kemur tað at merkja fiskiskapin tað fyrstu tíðina. Eftir tað kann væntast, at fiskiskapurin í tonsum sum heild verður tann sama, men at færri og størri fiskar verða fiskaðirr.

- Og tað hevur nógvar fyrimunir, bæði í framleiðsluni og viðvíkjandi fiskaprísi, so at meira fæst burtur úr enn við einum ov stórum veiðutrýsti. Eisini kann væntast, at sveiggini í fiskiskapinum verða minni, sigur Fiskirannsóknarstovan.



*Veiðitýstið má minkast og tað kann gerast við at minka dagatalið hjá húkaflotanum 50%. Men serliga eigur toska- og hýsukvotan, sum lemmatrolararnir hava fingið, at detta burtur. Ístaðin eiga lemmatrolararnir at koma upp í dagaskipanini, sigur Fiskirannsóknarstovan*

*Savnsmynd*






*– Í øllum hurlivasanum á eini frisørsalong við fønarum og øðrum óljóði, havi eg ilt við at síggja, at hon nýtir tónleikin sum undirhald hjá kundunum, vísir Bjørn á Heygum á, sum er advokaturin hjá Salong Tótu, sum Koda krevur pening frá*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Útvarpið er ikki undirhald

**Advokaturin hjá Salong Tótu, Bjørn á Heygum, heldur ikki, at Koda kann áleggja salongini at rinda pening til tónleikafelagskapin. Orsøkin er einføld: Útvarpstónleikurin verður ikki nýttur sum undirhald hjá kundunum, men heldur er talan um eitt útvarpstól, sum flest øll onnur arbeiðspláss hava dagliga standandi frá**

KODA PENGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Eg havi lovað Tótu at kanna málið til botns. Einki mál av sami slagi hevur áður verið í Føroyum, og tí ætli eg mær at kanna, hvørji líknandi mál, danir hava havt. Hetta kanningararbeiðið eri eg farin undir.

Bjørn á Heygum er sakførarin hjá Salong Tótu, sum týsmorgunin var til fyrsta fyrireikingarfundin um Koda pengar. Danski tónleikafelagskapurin, Koda, sum eisini umboðar føroyskar og grønlendskar tónleikarar, krevur, at Salong Tóta rindar pening til tónleikafelagskapin, tí hon hevur eitt útvarpstól standandi frá í salongini.

Hesum sýtir eigarin av salongini, Tóta Sørensen, fyri, og tí er málið endað hjá fútanum.

### Tíðindi

Kjarnan í trætuni millum Salong Tótu og Koda er, hvørt salongin nýtir tónleikin í útvarpinum sum ein undirhald hjá kundunum ella, um hon hevur útvarpið standandi frá, sum flest øll onnur arbeiðspláss í Føroyum

Bjørn á Heygum greiðir frá, at hann á fyrsta fyrireikingarfundinum í málinum millum Salong Tótu og Koda, gjørdi greitt, at Tóta fyrst og fremst nýtir útvarpstólið at lurta eftir tíðindum.

– Í øllum hurlivasanum á eini frisørsalong við fønarum og øðrum óljóði, havi eg ilt við at síggja, at hon nýtir tónleikin sum undirhald hjá kundunum, vísir Bjørn á Heygum á.

### Halda lógina

Í lógini um upphavsrætt, ið upprunaliga er frá 1961, stendur ítøkiliga, at lógin eisini fevnir um frisørar, sólsentur og handlar.

Tóta Sørensen ásannaði í Sosialinum týsdagin, at vónirnar at vinna sakarmálið ikki vóru av teimum bestu, tá lóggávan hevur eina ítøkiliga áseting um frisørar. Bjørn á Heygum slær eisini fast, at sjálvsagt eiga frisørar at vera fevndir av lógini um upphavsrætt, um tónleikurin verður nýttur sum eyka undirhald hjá kundunum.

– Tónleikurin, sum er at hoyra í salongini hjá Tótu er ikki partur av undirhaldi, og tí áttu tað ikki at verið álagt henni at rinda pening til Koda. Er talan um salongir ella handlar, sum nýta tónleik sum undirhald til kundarnar, skulu tey sjálvsagt verða fevnd av lógini. Í málinum millum Tótu og Koda er hetta eftir mínum tykki ikki galdandi, og tí kann spurningur setast við, um hon eigur at rinda pening til Koda, greiðir Bjørn á Heygum at enda frá.

# Ikki nøkur herferð

**Millumgongumaðurin hjá tónleikafelagsskapinum Koda í Føroyum, Kristian Blak, sigur, at talan ikki er um eina herferð, nú tónleikafelagsskapurin er farin undir at raðfesta innkrevjingina hægri.**

KODA PENGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Danski tónleikafelagsskapurin, Koda, sum hevur upphavsrættin hjá tónleikarum hjá um hendið, er av álvara farin undir at raðfesta innkrevjingina hægri.

- Vit hava ligið á latu síðuni í fleiri ár, men nú skal upphavsrætturin hjá tónleikarum raðfestast hægri í Føroyum. Hetta hevur millum annað við sær, at vit fara at krevja pening frá frisørsalongum, matstovum, sólsentrum og øðrum, sum spæla tónleik, ið kann bólkast sum undirhald, sigur føroyski millumgongumaðurin hjá Koda, Kristian Blak.

Hann leggur afturat, at talan er als ikki um eina herferð, men at Koda leggur nógv fyri at fara lagaliga fram í innkrevjingini. Umboðsfólk fyri Koda hava vitjað fleiri fyritøkur kring landið, og gjørt teimum greitt, at spæla tey tónleik, sum kann bólkast sum undirhald, eiga tey at skráseta seg hjá Koda

– Í Danmark og øðrum londum hava handlar, frisørar, sólsentur o.o., sum dagliga spæla tónleik, í fleiri ár verið kravd at rinda eina upphædd fyri spælda tónleikin. Hesum ætla vit nú at gera teimum eftir, sigur Kristian Blak

### Tíð og rúmd

Í Sosialinum í gjár kom undan kavi, at Koda álegði Salong Tótu at rinda góðar 700 krónur hvønn ársfjórðing í koda pengum, tí felagsskapurin metti, at hon spældi útvarpstónleik fyri kundunum.

Spurdur, hvussu Koda finnur fram til, hvussu nógv, hvør fyritøka skal rinda, svarar Kristian Blak, at metingin verður gjørd eftir, hvussu leingi tónleikur er at hoyra á arbeiðsplássinum og hvussu stór arbeiðsrúmini eru.

*Hvussu duga tit á at skyna, nær talan er um eitt vanligt útvarp, sum stendur frá, ella um eina fyritøku, sum nýtir tónleik sum undirhald hjá kundunum?*

– Eg haldi tað er ein stórur munur á, um fyritøkan ella handilin hevur eitt stórt annlegg við fleiri hátalarum ella eitt líti transistoradio. Hevur tú eitt flott annlegg við fleiri hátalarum, haldi eg tað ber væl til at grundgeva fyri, at spældi tónleikurn hjá fyritøkuni ella handilin kann bólkast sum undirhald hjá kundanum. Er talan bert eitt lítið transistoradio er søgan ein heilt onnur, svarar Kristian Blak

### Meldið tykkum sjálvi

– Tað tekur sjálvsagt fleiri ár, áðrenn allar fyritøkur, ið eiga at rinda koda pening, verða skrásettar hjá okkum. Eg vil enn einferð sláa fast, at talan er als ikki um nakra herferð, men heldur um eina hægri raðfesting av rættindinum hjá tónleikarunum. Allar okkara okkara grannatjóðir raðfesta hetta økið høgt, sigur Kristian Blak

Hann mælir fyritøkunum, sum dagliga spæla tónleik, at seta seg í samband við Koda, so ein avtala kann verða fingin í lag í sátt og semju.